# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



26. mai fingu Anna og Reynhold Madsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4400 gr. Her sita systrarnar Helena og Annika við lítlusystrini

14. mai fingu Tanja Pleh og Pætur Joensen, Ollerup ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3200 gr.

17. mai fingu Rebekka Thorsteinsson og Finnbogi Magnussen, Vágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4050 gr.

24. mai fingu Anja og Ólavur Zachariasen, Eiði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

26. mai fingu Kristina í Króki og Karl Jakob Ósá Eliasen, Klaksvík. eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4050 gr.

27. mai fingu Lív og Henry Mellemgaard, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2300 gr.

27. mai fingu Birita og Janus Martin Joensen, Norðragøtu, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4400 gr.

27. mai fingu Inna Sigvardsen og Petur Elias Petersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3300 gr.

30. mai fingu Vár í Gong og Johann Behrens, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm long og vigaði 4550 gr.

30. mai fingu Majbritt og Mads A. Winther, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3000 gr.

31. mai fingu Lillian Djurhuus og Bjørn Thorsteinsson, Hoyvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4800 gr.

## Starvsdagur

Mánadagin 6. juni 2005 hevur Kári Nielsen, maskinmeistari á Fossáverkinum arbeitt í 45 ár hjá Elfelagnum SEV.

## Brúdleyp

Í dag, 4. juni giftast í Aalborg Rådhus Rannvá í Nesinum Olsen av Argjum og Kent Hytten úr Aalborg. Veitsla fyri innbodnum verður á Vegavej 78, 9200 Aalborg SV.

Í dag, 4. juni kl. 12.00 giftast í Evangeliihúsinum Rigmor Skála Jacobsen, Tórshavn og John Fonsdal, Vestmanna. Veitslan verður á Hotel Hafnia fyri innbodnum.

Í dag, 4. juni kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hildigerð Højgaard, Saltnes og Pól á Sondum Óskarson, Sandur. Borðhaldið verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

# Tríggir starvsdagar hjá Barnatannarøktini

**Mikudagin 1. juni 2005 høvdu trý av starvsfólkunum á Barnatannarøktini hjá Tórshavnar kommunu í Tórsgøtu í Havn ávikavist 20 og 10 ára starvsdagar. Tær vóru Alma Hansen og Karla Dahl, sum høvdu 20 ára starvsdag, og Anna Magnussen, ið hevði 10 ára starvsdag**



*F.v.: Alma Hansen, tannrøktari, Karla Dahl, klinikkassistentur, Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Anna Magnussen, klinikkassistentur*

Mynd: Jens Kristian Vang

Umboð fyri Tórshavnar kommunu, saman við borgarstjóranum Heðini Mortensen, komu á gátt og handaðu teimum trimum blómur á starvsdegnum.

Alma Hansen, tannrøktari, hevði 20 ára starvsdag 25. februar 2005.

Alma er uppvaksin í Funningsfirði. Hon var fyrst útbúgvin sum klinikkassistentur, men fór í 1988 undir víðari útbúgving til tannrøktara. Var liðug sum tannrøktari í juni 1990 og frá mars 1991 hevur Alma starvast hjá Barnatannarøktini í Tórshavnar kommunu sum tannrøktari burturav.

Alma er gift við Emil Jacobsen, ið er lærari, saman hava tey trý børn: Sunneva 13 ár, Sólbjørg 10 ár og Steinar 2 ára gamal. Tey búgva á Skála.

Karla Dahl hevði 20 ár starvsdag 1. juni. Karla, f. Thomsen, er ættað úr Syðrugøtu. Hon fór í læru sum klinikkassistentur hjá Magnusi Jensen, tannlækna, í 1973. Frá 1980-83 búði familjan í Grønlandi. Seinastu 20 árini hevur hon starvast hjá Barnatannarøktini. Karla var gift við Kristian Dahl, ið doyði í 1998. Hon hevur 3 børn, Paula 24, Fróði 19 ár og Sveinur 10 ár

Anna Magnussen hevði 10 ára starvsdag 1. juni. Anna, f. Dam, er úr Havn og hon er útbúgvin klinikkassistentur. Hon er gift við Magnus Magnussen, úr Havn. Tey eiga 4 børn: Heine 22 ár, Terji 19 ár, Guðrun 17 ár og Turið 7 ár.

# Magni Arge 10 ára starvsdag hjá Atlantsflog

1. juni 2005 vóru 10 ár liðin síðan Magni Arge tók við sum stjóri á føroyska flogfelagnum Atlantic Airways.

Starvsfólkini hava saman við honum tikið nógv tøk hesi árini.

Tá átti felagið eitt flogfar, sum fleyg millum Vágar og Keypmannahavn, eisini áttu teir eina tyrlu og umleið 40 fólk starvaðust hjá felagnum.

Í dag hevur felagið 4 flogfør og rekur tvær tyrlur. Flogið verður til 9 ymsar býir í summar: Oslo og Stavanger í Norra, Reykjavík í Íslandi, Aberdeen, Edinburg og London í Stórabretlandi, og Billund, Aalborg og Keypmannahavn í Danmark. Eisini hevur felagið vaksið munandi um flúgvingina í øðrum londum – eitt nú í Norra, millum Ísland og Grønland, og millum Skotland og Sveits.

Í summar starvast umleið 150 fólk hjá Atlantic Airways.



## Dagurin

**4. juni. Obtatus,** deyður umleið ár 390. Var upprunaliga heiðin maður, sum gjørdist kristin og endaði sum biskupur í Milevis í Numidiu. Hann doyði strádeyðan.

**5. juni. Grundlógardagur,** hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849.

Dagurin ber annars navnið *Bonifacius.* Hann var enskur munkur, sum var tiltikin trúboðari og fekk navnið ápostul Týsklands. 80 ára gamal varð hann saman við 52 øðrum myrdur av heidningum í Frísalandi hvítusunnudag ár 754.

*Jákup Dahl varð føddur hendan dagin 1878 og deyður í 1944.*

**6. juni. Norbertus,** deyður í 1134. Týskur aðalsmaður, sum stovnaði eina nýggja munkaskipan í Premontre í Fraklandi og seinni gjørdist biskupur í Magdeburg.